FØROYA RÁFISKAKEYPARAFELAG
SÍÐAN 1967

Uttanríkis- og fiskimálaráðið
ufmr@ufmr.fo

Tórshavn 22. juli 2026

Okkara tilv./Our ref.
7109-305/Øssur /Fxroya-Rxf-B-H
Tykkara tilv./Your ref.

Hoyringarsvar til uppskot til Løgtingslóg um serstakar fiskidagar til bólk 5 B fyri fiskiárið 2026

Ráfiskakeyparafelagið hevur viðgjørt uppskotið til løgtingslóg um serstakar fiskidagar til bólk 5 B fyri fiskiárið 2026.

Felagið hevur virðing fyri teimum avbjóðingum, sum eru hjá útróðrarvinnuni, men metir samstundis, at uppskotið er í stríð við fleiri grundleggjandi meginreglur, sum føroyska fiskivinnuumsitingin byggir á.

Ráfiskakeyparafelagið mælir tí staðiliga frá, at uppskotið verður samtykt í verandi líki.

1. Uppskotið víkir frá grundarlagnum undir fiskidagaskipanini

Fiskidagaskipanin hevur verið grundarlagið undir umsitingini av føroyskum botnfiskafiskiskapi síðani 1996. Hóast skipanin ikki er fullkomin, hevur hon saman við umsitingarætlanini og veiðiregluni tryggjað eina meira gjøgnumskygda, forútsigiliga og fakliga grundaða umsiting.

Í lógaruppskotinum verður beinleiðis staðfest, at uppskotið víkir frá galdandi umsitingarætlan og veiðireglu.

Ráfiskakeyparafelagið metir, at hetta er ein grundleggjandi trupulleiki. Um politiska skipanin byrjar at gera undantøk frá teimum reglum, sum sjálv umsitingarætlanin byggir á, viknar álitið á skipanina og á føroysku fiskivinnuumsitingina.

2. Landsstýrismaðurin ávarar sjálvur ímóti avleiðingunum

Ein serligur veikleiki við uppskotinum er, at landsstýrismaðurin í viðmerkingunum sjálvur staðfestir teir váðar, sum uppskotið kann hava.

Millum annað verður sagt, at:

- fleiri fiskidagar enn veiðireglan loyvir kunnu ávirka úrslitið av eftirmetingini hjá ICES,
- hetta kann ávirka arbeiðið við MSC-góðkenningini
- og uppskotið kann hava neiligar avleiðingar fyri burðardygga umsiting av toskastovninum.

Við øðrum orðum verður mælt til eina lóg, samstundis sum viðmerkingarnar lýsa teir álvarsligu váðar, sum sama lógaruppskot kann hava.

Ráfiskakeyparafelagið heldur, at hetta eigur at geva bæði ráðnum og Løgtinginum orsøk til at endurhugsa uppskotið.

3. MSC-góðkenningin eigur at verða vard

MSC-góðkenningin er í dag ein av teimum týdningarmestu kappingarfyrimununum hjá føroysku fiskivinnuni.

Sjálvt lógaruppskotið staðfestir, at góðkenningin hevur avgerandi týdning fyri føroyskan útflutning og serliga fyri virking og sølu av botnfiski.

Flakavirkini hava í nógv ár havt sera avbjóðandi rakstrarlig kor. Árið 2025 var fyrsta árið í langa tíð, har flestu virkini høvdu munandi betri úrslit, og gongdin higartil í 2026 hevur verið jalig.

Meginparturin av føroysku upsaframleiðsluni verður seldur á marknaðum í Týsklandi og Fraklandi, har MSC-góðkenning er ein grundleggjandi treyt fyri at varðveita marknaðaratgongd og góðar prísir.

At seta hesa góðkenning í váða fyri eina stutttíðar loysn hjá einum einstøkum skipabólki kann fáa álvarsligar búskaparligar avleiðingar fyri alla virðisketuna – fiskimenn, fiskakeyparar, flakavirkir, útflutning og arbeiðspláss á landi.

4. Javnrættur millum skipabólkar

Ráfiskakeyparafelagið vísir á, at fleiri aðrir skipabólkar hava verið noyddir at gevast við fiskiskapi, tá fiskidagarnir vóru uppi.

Millum annað eru línuskip løgd og manningin uppsøgd, meðan onnur hava ligið bundin, hóast hetta er høvuðsvinnan hjá manningunum. Somuleiðis hava aðrir skipabólkar góðtikið galdandi reglur, hóast tær hava havt stórar fíggjarligar avleiðingar.

Verður nú gjørt serligt undantak fyri bólk 5 B, verður tað sera trupult at grundgeva fyri, hví aðrir skipabólkar ikki skulu hava somu viðferð.

Hetta kann gerast eitt fordømi, sum undirgrevur javnrættin og trúvirðið hjá allari fiskidagaskipanini.

5. Orsøkin til dagatrotið í bólki 5 B er økt virksemi

Hagtølini frá Vørn vísa greitt, at orsøkin til dagatrotið er ein munandi øking í virkseminum hjá bólki 5 B.

Ár	Bátar	Kg	Kr.	Kr/kg.
2026	339	1.365.554	45.313.888	33,18
2025	324	1.452.083	42.799.951	29,47
2024	254	1.038.940	22.596.887	21,75
2023	238	1.009.882	19.050.629	18,86

Frá 2023 til fyrra hálvár 2026 er talið av bátum vaksið við umleið 42%, meðan miðalprísurin er hækkaður við umleið 76%.

Hetta er høvuðsorsøkin til, at fiskidagarnir eru brúktir skjótari enn áður.

Um fiskidagarnir í øðrum skipabólkum í fiskidagaskipanini høvdu verið brúktir á sama hátt sum í bólki 5 B, hevði hetta neyvan viðført, at dagatalið varð hækkað, og Ráfiskakeyparafelagið metir tí ikki, at hetta í sjálvum sær kann vera grundgeving fyri at broyta reglurnar aftaná.

6. Rættartrygd og forútsigilig umsiting

Ein grundleggjandi treyt fyri allari vinnuligari fiskivinnu er, at karmarnir eru støðugir og forútsigiligir.

Skipaeigarar, fiskakeyparar, flakavirkir, fíggingarstovnar og altjóða keyparar leggja sítt virksemi til rættis út frá galdandi lóg og teimum fiskidøgum, sum eru ásettir sambært umsitingarætlanini.

Verða karmarnir broyttir við serligum undantøkum mitt í fiskiárinum, viknar grundarlagið undir eini forútsigiligari umsiting.

Hetta kann eisini ávirka altjóða álitið á føroysku fiskivinnuumsitingina.

7. Uppskotið loysir ikki trupulleikan

Ráfiskakeyparafelagið metir, at uppskotið ikki loysir sjálvan trupulleikan.

Um talið av bátum heldur fram at vaksa, og prísirnir framvegis eru høgir, er sannlíkt, at sama støða fer at endurtaka seg komandi ár.

Ein varandi loysn eigur tí at verða funnin í sambandi við endurskoðanina av umsitingarætlanini og veiðiregluni og ikki við serligum undantøkum í einstøkum fiskiárum.

Niðurstøða

Ráfiskakeyparafelagið hevur virðing fyri teimum avbjóðingum, sum bólkur 5 B stendur í.

Kortini kann felagið ikki taka undir við einum lógaruppskoti, sum sjálvt staðfestir, at tað kann hava neiligar avleiðingar fyri burðardygdina, MSC-góðkenningina og trúvirðið hjá føroysku fiskivinnuumsitingini.

Felagið metir, at ein varandi loysn eigur at verða funnin gjøgnum eina samlaða endurskoðan av umsitingarætlanini og veiðiregluni, har allir skipabólkar verða viðgjørdir eftir somu meginreglum.

Ráfiskakeyparafelagið mælir tí staðiliga til, at uppskotið verður tikið aftur og ikki lagt fyri Løgtingið í verandi líki.

Vinarligast

Nevndin í
Føroya Ráfiskakeyparafelag